


# Koloskopi-kanning

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS

Innihaldið í hesum faldaranum er dagført 08/07/2023

## HVAT ER KOLOSKOPI

Koloskopi er ein kikarakanning av langanum. Læknin, sum ger kanningina, sær tarmrovuna og um broytingar eru.
Í gjøgnum eina kanal í kikaranum ber til at taka vevna til kanningar.

## FYRIREIKINGAR TIL KANNINGINA

Tað er umráðandi, at tarmurin er væl úttømdur, so tarmrovan sæst so væl til ber.
Tú skalt keypa Picoprep til úttøming, sum fæst í handkeyp á Apotekinum, og fylgja vegleiðingini, ið tú fært frá teimum.
Beint undan kanningini verður ein nál løgd í eina æðr í arminum, so tað er møguligt at geva doyvandi og linnandi heilivág.

## HEILIVÁGUR

Um tú tekur heilivág, skalt tú taka hetta sum vanligt.
Tekur tú jarntablettir, skalt tú gevast við hesum fýra dagar áðrenn, tú byrjar úttømingina.
Hevur tú insulinkrevjandi diabetes, ella tekur tú blóðtynnandi, skalt tú seta teg í samband við læknaskrivaran tlf. 34 33 00 lokal 3227.

## KANNINGIN

Tú skalt møta fastandi á seingjadeildini til avtalaðu tíð.

Kanningin tekur ½ – 1 tíma og verður gjørd á skurðdeildini.

Tú liggur á vinstru lið í songini.

Ein slanga (uml. á tjúkd við tummilin) verður førd inn í baktarmin og upp í langan.

Fyri at síggja tarmrovuna, verður luft blást inn í tarmin, meðan kanningin verður gjørd. Hetta kann spenna, pressa og geva magapínu. Tú kanst verða plágaður av luft í tarmunum restina av degnum.

Av tí, at tað er ymiskt, hvussu langa tíð kanningin tekur, kann tað verða bíðitíð.

## EFTIR KANNINGINA

Læknin kemur á seingjadeildina seinni um dagin og sigur tær, hvat hann hevur sæð.
Er vevnaður tikin til kanningar, ganga 1 – 2 vikur til svarið er komið.

Avtalað verður, hvussu tú fært úrslitið.

Av tí, at tú hevur fingið doyvandi heilivág, mást tú ikki koyra bil restina av degnum. Heilivágurin ger eisini, at tú, møguliga, ikki minnist alt frá kanningini.

Fært tú sterka magapínu, varnast blóð í opningi ella frískt blóð frá baktarminum, skalt tú venda tær til sjúkrahúsið.



*Eru ivamál, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á tlf. 34 33 00.*

*Vinarliga*

*Suðuroyar Sjúkrahús*

**Um tú ikki kanst møta ásettu tíð, verður tú vinarliga biðin at ringja tlf. 34 33 00 lokal 3227.**